# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kyoto – sjón fyri søgn

Tað gongur sjón fyri søgn: veðurlagið í heiminum er veruliga broytt. Lufthválvið ella atmosferan, er ornað, og hetta ber við sær ógvusligar broytingar í veðurlagnum. Í roynd og veru merkir hetta, at árligi meðalhitin veksur, og hetta kann aftur leiða til nógvan hita, skerping, ódnir og ómetaligan kulda alt eftir árstíðunum ymisk støð á jørðini. Við ST sáttmála - tí sonevndu Kyoto protokollini ella sáttmálanum, sum varð samtykt í Kyoto tann 11. desember 1997, binda luttakaralond seg til í fyrsta lagi at minka um útlát av sonevndum vakstrarhúsgassum, og í øðrum lagi binda londini seg til at seta ítøkilig tiltøk í verk til tess at bøta um støðuna í lufthválvinum og harvið í øllum heiminum.
ES samtykti Koyoto í 1998 og síðan hava heilt nógv av heimsins londum boðað frá, at tey taka undir við sáttmálanum. Nøkur stór ídnaðarlond eru tó enn uttanfyri. Hetta eru lond, sum antin meta sáttmálan sum eina forðing fyri ídnaðarmenning t.d. Kina ella lond, sum heilt einfalt halda tað vera ov dýrt fyri vinnuna at binda seg til Kyoto protokollina. Millum hesi lond eru USA. Tað eru mong, sum halda, at so leingi ávís stórveldi ikki eru við í Kyoto protokollini um veðurlagsbroytingar, so er alt sum einki. Tey siga sum so: hvat hjálpir, at nøkur minka um útlatið, tá onnur ikki gera tað?

Hetta er sera skeivur hugsunarháttur. Allur bati bøtir, og hvørja ferð eitt land ella eitt ríkjasamband tekur undir við Kyoto, so økist trýstið á tey, sum enn himprast. Umhvørvisspurningar fáa alt meira pláss í politiska orðaskiftinum. Í USA, har mótstøðan móti Kyoto hevur verið stór eitt nú í flokki forsetans er nú vend við at koma í. Tøknin gerst alt meira framkomin og alt bendir á, at vit kunnu minka um útlátið uttan at lækka okkara livistøði.

Føroyar eru millum teirra, sum himprast við at taka undir við Kyoto. Tey, sum eru ímóti, skylda uppá veiðiflotan og uppá eina komandi oljuvinnu. Henda støða er ikki haldgóð. Granskarar ávara og seinasta ávaringin kom frá okkara mæta granskara Boga Hansen, tá hann í fjør heyst fekk umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins. Vit hava mangan lyndi at illskast inn á tey ídnaðarlond, sum dálka okkara havumhvørvi, samstundis sum vit gloyma, at Føroyar uppá seg eru millum teir stóru syndararnar, tá hugsað verður um útlát av skaðiligum evnum. Kanska útlatið ikki vigar so tungt í heimshøpi, men hetta leggur á okkum eina moralska ábyrgd, sum er tung at bera. Tjóðveldsiflokkurin hevur lagt uppskot fyri løgtingið um, at Føroyar skulu taka undir við Kyoto. Hetta er eitt gott uppskot, sum allir tingflokkar áttu at kunna tikið undir við.

**Sosialurin**

# Danin er fanin

JOHN JOHANNESSEN
Løgtingsmaður
www.john.fo



**Nú gjørdi Hergeir Nielsen tað púra greitt. Málið um møguligan ólógligan flutning av fangum í føroyskum loftrúmi er fyri hansara flokk ikki ein spurningur um rættindini hjá fangunum, men eitt gylt høvi at skapa enn eina fíggindamynd av dønum og fáa í lag eitt nationalistiskt rumbulsmál**

Havi higartil verið rættiliga fegin um, at Hergeir Nielsen og eg sjálvur hava drigið nøkulunda somu línu í uttanlandsnevndini, tá tað snýr seg um at verja mannarættindi. Men avdúkingin í seinasta lesarabrævi hansara fær meg at harmast.

Í trimum umførum í lesarabrævinum “Søgufalsanin hjá John Johannessen” ger Hergeir Nielsen klassisku støðuna púra greiða: Danin er fanin, og síðani kemur alt annað í aðru røð. Vónandi hevur Hergeir Nielsen skrivað lesarabrævið í sinnismuni og er tí komin at gera í so nógv av. Í øllum førum er nógv, sum bendir á tað borðið. Tí umframt at innihalda hesa óheppnu avdúking, so er restin av brævinum ein niðrandi viðgerð av mínum persóni. Og hóast júst slíkur atburður er vorðin eitt alt meira vanligt vápn hjá nógvum politikarum, so plagar Hergeir Nielsen at vera ov dugnaligur til slíkt.

### Hvør falsar søguna?

Óhepni orðadrátturin, ið ikki er virðiligur fyri hetta álvarsmál, byrjaði við einum lesarabrævi hjá formanni Tjóðveldisfloksins í vikuni. Hesin legði meg undir at látast at vera ímóti ólógligum flutningi og píning av fangum, umframt at hann sum talsmaður fyri alt tað góða og reina royndi at geva mær ábyrgdina av 34.452 drápum í Irak. Tá var tað, at søgufalsanin fór fram.

Í undanfarnu grein míni gjørdi eg greitt - enntá við støði í skjalprógvum - hvør greiða støðan hjá Javnaðarflokkinum síðani 2002 hevur verið til málið um nýtslu hjá amerikanska hervaldinum av føroyskum loftrúmi. Á fundinum 3. oktober 2002 vildi Andrias Petersen ikki lata føroyskt loftrúm verða nýtt til eitt álop á Irak, sum heimssamfelagið var ímóti.

Í gerðabókini frá hesum fundi stendur soleiðis um støðuna hjá Javnaðarflokkinum:

*“Ein minniluti, Andrias Petersen, tekur ikki undir við, at loyvið hjá amerikanskum stríðsflogførum verður givið treytaleyst, men mælir til, at málið um álop á Irak fyrst skal roynast í ST høpi”.*

Í gerðabókini frá sama fundi stendur soleiðis um støðuna hjá Hergeiri Nielsen:

*“Ein minniluti Hergeir Nielsen heldur, at málið ikki er búgvið at taka støðu til”.*

Og í brævinum til løgmann dagfest 3. okt. 2002, sum Hergeir Nielsen nú sipar til, sigur Hergeir Nielsen millum annað soleiðis:

*“Vísandi til løgtingssamtyktirnar um uttanveltaðu støðu Føroya og til almennu ætlan Føroya um at tryggja sær fult innlit í og avgerðarrætt á øll uttanríkis- og verjupolitisk mál, ið kunnu hugsast at hava týdning fyri Føroyar og føroyingar heldur minnilutin, **at málið ikki er búgvið at taka støðu til**”.*

Tí undrar tað meg ikki sørt, tá Hergeir Nielsen skírir meg søgufalsara, tá eg í fyrru grein míni sigi, at Javnaðarflokkurin í 2002 var einsamallur um at gera greitt, at flokkurin ikki góðtók misnýtslu av føroyskum loftrúmi til feigdarátøk. Velji kortini at trúgva, at henda álvarsama útsøgn er gloppin Hergeiri á pappírið av ósketni. Tí skal tað vera honum fyrigivið.

### Nationalistiskt kot

Tað sum kortini harmar meg almikið er, at Tjóðveldisflokkurin nú eisini letur málið um píndar fangar í eitt nationalistiskt kot. Tað er at skúgva álvaran í málinum til viks, skapa enn eina ræðumynd av dønum og brúka málið til flokspolitiskan vinning. Hetta prógvar skrivingin alt samalt. Dømini eru fleiri í lesarabrævinum hjá Hergeiri Nielsen umframt í brævinum hjá formanninum.

- Hergeir Nielsen: *“Saman við áralongu mannvondu herferðini hjá dønum við einum ivingarsomum ST-mandati, tagnaði so eisini hetta einasta mótmæli frá Javnaðarflokkinum”.*
- Hergeir Nielsen: “*John Johannesen og teir hava mótvegis øllum viti og skili í løgtingssamtykt slept øllum uttanríkispolitiskum valdi av hondum og ganga nú og veittra við einum Fámjinsskjali, sum ikki er vert tað pappír, tað er skrivað á”.*
- Hergeir Nielsen: “*Tað allar minsta vit kunna gera fyri at støðga hesum ótýdligu brotunum á mannarættindini, er átaka okkum ræði á egnum viðurskiftum...”*
- Høgni Hoydal: *“Teir vita eins væl og eg og tú, at um Uttanlandsnevndin tordi at siga nei og mótmæla, at okkara loftrúm verður nýtt til krígsendamál, so hevði danska stjórnin givið loyvi kortini. Og so var alt tosið um Fámjins-skjal og “ægte medinddragelse og indflydelse” avdúkað sum tað bluffið, tað er***”.**

Hetta nationalistiska gyklið er altso støðan hjá Tjóðveldisflokkinum til, at eg í mínum virki í uttanlandsnevndini havi heitt á løgmann um greitt at senda út politiskan boðskap um, at føroyingar ikki góðtaka møguligan ólógligan fangaflutning í føroyskum loftrúmi. Og í øðrum lagi at fáa kannað og staðfest um hetta er nakað, ið veruliga fer fram í føroyskum loftrúmi.

Havi leingi havt eina vón um, at tað fór at bera til skapa eina samgongu á vinstravonginum. Men tað gerst alsamt meira greitt, at tráanin og muran stendur aðrar vegir.

Eg yppi øksl í undran og harmist almikið...

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.